## Russar siga nei

Tað eydnaðist ikki Anders Fogh Rasmussen, NATO-aðalskrivara at fáa russisku stjórnmina at styðja NATO í bardaganum við Taliban í Afghanistan. Á fundi við russisku leiðsluna bað Anders Fogh Rasmussen um hjálp frá russiskum tyrlum, eins og hann vildi hava russiska herin at venja afghanskar hermenn. Men aftan á fundin í Moskva segði aðalskrivarin við BBC, at hann hevði ikki fingið játtandi svar. Anders Fogh Rasmussen steðgaði tríggjar dagar í Moskva, og har hitti hann millum annað Dmitrij Medvedev, forseta og Vladimir Putin, forsætisráðharra.



## Kent skelti stolið

Onkur hevur stolið tað kenda skeltið, sum hekk oman fyri inngongdina til ta gomlu nazistisku týningarleguna Auschwitz í Pólandi. Skeltið við teimum kendu orðunum "Arbeit macht frei" hvarv tíðliga í morgun. Nazistatnit grundløgdu ta kendu leguna í 1940. Tann 27. januar í 1945 tók sovjetski herurin leguna og fríaði teir 7.650 fangarnar, sum enn vóru á lívi. Rudolf Höss, sum var leiðari í Auschwitz, segði undir avhoyring seinni, at umleið tríggjar milliónir fólk vórðu týnd í leguni frá 1941 til 1944. Kanningar hava tó víst, at tað rætta talið var helst umleið 1,1 millión fólk.

# Halda fast við avgerð um 10. flokk

**Á býráðsfundi í gjárkvøldið samtykti Tórshavnar býráð at halda fast við avgerðina um, at bert ein 10. flokkur skal verða í kommununi**

BÝRÁÐSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Býráðið í Havn samtykti í gjárkvøldið, at tað bert verður tann eina eindin av 10. flokki frá komandi skúlaári at rokna, og tann eindin skal halda til her í Eysturskúlanum*

Nógv kjak og einstakar mótmælisgongur hava staðist av ætlanunum hjá býráðnum at leggja allar 10. flokkar í kommununi saman í eina eind, sum skal halda til á Eysturskúlanum.

Málið hevur verið væl lýst við arbeiðsbólki. Í honum hava sitið Eyðdis Eidesgaard, formaður, umboð fyri skúlastjórarnar, Jacob Thomsen, lærari í Tórshavnar Kommunuskúla, Sínum Joensen, lærari í Eysturskúlanum, Birgir Mortensen, lestrarvegleiðari í Handilsskúlanum, umboð fyri miðnámsskúlarnar, Joel undir Leitinum, stjóri í Samskip, umboð fyri vinnulívið, og Høgni Joensen, skrivari, umboð fyri býráðið.

Málið byrjar í 2007 við hesum arbeiðsbólkinum, og 2. oktober hetta árið leggur bólkurin sítt álit fram fyri Mentamálanevndina. Bólkurin er ikki samdur um eitt felags tilmæli, og Eyðdis Eidesgaard, Símun Joensen, Birgir Mortensen, Joel undir Leitinum og Høgni Joensen mæltu til, at 10. flokkarnir vórðu lagdir saman í eina eind, sum skal húsast í Eysturskúlanum, meðan Jacob Thomsen mælti til tvær eindir.

Meirilutin sigur í sínum tilmæli: » Meirilutin heldur, at í Tórshavnar kommunu skulu allir 10. floks næmingar verða savnaðir í ein depil, sum skal geva teimum, ið taka av tilboðnum, eitt spennandi og fjølbroytt skúláár, har tey koma at hitta nýggjar floksfelagar og lærarar og leggja lunnar undir framtíðarlesnað og framtíðaryrki.

10. floksdepilin skal ikki verða partur av einum øðrum skúla, men verður ein sjálvstøðugur skúli við egnari leiðslu og lærarum.

Neyðugt verður at seta ein skúlaleiðara og ein varaskúlaleiðara, eitt skrivstovufólk og uml. 10-12 lærarar, sum burturav undirvísa í 10. floksdeplinum. Væntast skal, at tveir lærarar eisini hava útbúgving sum lestrarvegleiðarar. Hinir lærararnir skulu í høvuðsheitum tryggja, at næmingarnir verða undirvístir í lærugreinum og breytum«.

### Fylgdu meirilutanum

Jacob Thomsen sigur í sínum tilmæli: » Minnilutin mælir til, at 10. flokkarnir verða skipaðir í tvær skúlaeindir. Onnur skúlaeindin verður knýtt at Kommunuskúlanum og hin at Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og í Venjingarskúlanum, skulu sjálvir gera av, hvørja skúlaeind teir velja«.

Eisini í býráðnum hevur ósemja verið um, hvørja leið gangast skal, og á býráðsfundinum í gjárkvøldið valdi Maria Hammer Olsen, sum annars er partur av býráðssamgonguni, at fara í part við andstøðuni, sum vildi hava málið aftur fyri mentamálanevndina.

Hetta uppskotið fall tó við fimm atkvøðum fyri, meðan restin av samgonguni atkvøddi ímóti. Síðani varð atkvøtt fyri meirilutaúppskotinum, og tá atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov og Levi Mørk fyri, meðan Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen ikki greiddu atkvøðu.

Hetta merkir so, at frá næsta ár verður 10. flokkur skipaður sum ein eind í Eysturskúlanum.

# Havnarskrivstovan umvælast

**Býráðið hevur samtykt at játta tvær milliónir krónur at umvæla og víðka havnarskrivstovuna á Eystaru vág**

BÝRÁÐSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Havnarskrivstovan hjá Tórshavnar havn skal nú umvælast og víðkast. Flutt varð inn ð í verandi høli í 1987, og nú er so ætlanin at víðka um hølini.

Havnarskrivstovan heldur til í ovastu hædd í bygninginum hjá Faroe Ship á Eystaru vág. Víddin er tilsamans 241 fermetrar og parturin hjá havnarskrivstovuni er 152 fermetrar, men Faroe Ship er sinnað at leiga hinar 90 fermetrarnar til havnarskrivstovuna.

Umframt at vaksa um havnarskrivstovuna er eisini ætlanin at gera umfatandi broytingar av havnarskrivstovu og innbúgvi.

Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari lisitatión, og tey fimm tilboðini lógu úr 1.085.673 krónum upp í 1.724.492 krónur. Havnameistarin mælti til at taka av lægsta tilboðnum og tað var einmælt samtykt á býráðsfundinum í gjár.

Settar verða tvær milliónir av til arbeiðið, og tað var Búsetur, ið átti lægsta tilboðið og tískil fær arbeiðið.




*Havnarskrivstovan skal nú umvælast og víðkast, samtykti býráðið í gjárkvøldið*
*Mynd: Leo Poulsen*